# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# MIÐLAR Í BROYTINGARTÍÐUM

Tað var ein røtt avgerð, vit tóku, tá vit fyri tveimum mánaðum síðani broyttu útgávudagarnar hjá Sosialinum frá fimm vikuligum útgávum til tríggjar.

Hetta vísa sølutølini fyri fyrstu tveir mánaðirnar. Bera vit saman við somu mánaðir í fjør, so er framgongdin av seldum bløðum 12 prosent, og tað er væl meira, enn roknað varð við, tá avgerðin varð tikin um at minka um útgávudagarnar.

Seinastu 20 árini er Sosialurin komin á gøtuna fimm ferðir um vikuna, men rættiliga nógv er broytt í miðlaheiminum hesi árini. Umframt tøkniligu menningina, so varð einkarrætturin til at senda útvarp tikin av seinast í farnu øld soleiðis, at onnur nú eisini fingu møguleikan at senda útvarp og sjónvarp. Hesum møguleika gjørdu vit okkum sjálvandi dælt av – og Sosialurin keypti privatu útvarpsstøðina Rás2 í 2007.

Umframt tað at tøknin er ment so ómetaliga nógv, so hevur hetta eisini havt við sær, at vit við internetinum hava fingið heilt nýggjar miðlar, sum kollvelta miðlamyndina. Tí varð avgerðin um at broyta útgávutalið eisini grundað á hetta. Miðlahúsið hevur soleiðis ment seg út á fleiri miðlapallar: Sosialin, Rás2 og heimasíðuna www.portal.fo hjá Føroya Tele, umframt InternetSosialin og Sosialin í pdf-útgávu. Vit halda okkum síggja veruleikan í eyguni, at hesir nýggju og skjótu miðlarnir hava fingið alt størri týdning fyri tíðindaflutningin, og hevur blaðið, sum vit hava kent tað higartil, fingið eina aðra uppgávu við at hava øðrvísi tíðindaflutning, sum meira er sín egni við tíðindum, kjaki, reportasjum, ummælum samrøðum og øðrum.

Soleiðis fevnir tíðindavirksemið hjá Miðlahúsinum framvegis um tíðindi alt samdøgrið. Skjótu miðlarnir hjá okkum leggja enn sum áður dent á skjótu tíðindini, har Rás2 við fimm tíðindasendingum um dagin hevur fingurin á pulsinum, meðan




Portalurin alt samdøgrið verður dagførdur við tíðindum.

Hóast tað var í síðstu øld, at einkarrætturin til útvarp og sjónvarp varð avtikin, so hevur politiski myndugleikin enn ikki mengað at livað upp til krøvini, sum hetta setur einum public service kringvarpi. Løgtingið vil ikki játta neyðugu pengarnar, og stovnurin sleppur heldur ikki at hækka kringvarpsskattin tilsvarandi. Tí virkar okkara public service kringvarp framvegis á handilsligum grundarlag – í harðari og ójavnari og óræ ttvísari kapping við privatu miðlarnar, sum bara liva av teimum inntøkum, teir sjálvir megna at skapa sær.

## Sølan av blaðnum er vaksin við 12 prosentum

# Livar og teir komnir út á hav

Tað gongur skjótt fyri seg hjá Livar Nysted og hinum, sum í gjár fóru undir at rógva teinin úr New York í Amerika til Falmouth í Onglandi fyri at sláa 105 ára gamla metið skulu teir klára hetta undir 55 dagar.




Bátur og manning hava fingið eina góða byrjan - longu nú eru teir lagt somikið av sjógvi afturum seg, at teir eru komnir út á opið hav. Myndin vísir gongdina til klokkan 9 í morgun. Teir fór klokkan 14:00 í gjár. Tað ber til at fylgja teimum á slóðini www.trip.fo

Klokkan 7 í morgun høvdu teir róð 113 km. Um tað gongur væl, meta teir seg klára at rógva 160 km um samdøgrið.

Livar Nysted var annars sera varin áðrenn fráferð og segði, at tað kundi taka nógva tíð at koma leysur frá landi. Tó hevur tað víst seg, at higartil hevur tað gingið væl. Úti á opnum havi veitst tú ongantíð, hvørjar avbjóðingar standa fyri framman. Trupulleikarnir, ið standast upp umborð, mugu eisini loysast umborð.

Teir hava roynt at vart seg fyri hugsandi trupulleikum, eitt nú við at hava eyka árar við, eitt nú greiðir til at fiksa róróið við, um tað skuldi farið.



## Ikki ov tíðliga í skúla

JEFFREI HENRIKSEN
KJAK Á SÍÐU 13



## Hugburðurin til samkynd trupulleikin

JÓNA MORTENSEN
KJAK Á SÍÐU 13

# Summarmatinéir í Havnar kirkju

Havnar kirkja skipar fyri matiné hvønn leygardag í juni og juli mánaði. Vanliga er matiné ein leygardag um mánaðin, men um summarið hevur seinastu árini verið matiné hvønn leygardag. Matinéirnar eru leygardag klokkan 11.30 – 12 og eru serliga summarmatinéirnar bæði tilboð til borgarar í Havn og til ferðafólk, sum koma hendaveg. Tey fáa høvi til at uppliva livandi tónleik í hugnaligu kirkjuni og fáa innlit í, hvørjum støði føroyskur tónleikur er á.

Skráin til summarmatinéirnar er sera fjølbroytt. Tey, sum framføra eru yrkistónleikarar bæði úr Føroyum og aðrastaðni frá og ungir føroyingar, sum virka sum tónleikarar ella fáa sær útbúgving uttanlands. Summarmatinéinar er sostatt eisini eitt høvi hjá teim ungu at koma heim og vísa, hvussu gongst teimum uttanlands. Eisini fara vitjandi kór at framføra, og Summartónar hevur eisini eitt av sínum tiltøkum í Havnar kirkju ein leygardag í juni.

Teir komandi fýra leygardagarnar spæla hesi til matiné í Havnar kirkju:

5. juni Agnar Lamhauge, kontrabas. Jóhannes Andreasen, klaver

12. juni Jóannes Nolsøe, orgul

19. juni Torleik Mortensen, kontrabas

26. juni Jorunn Abrahamsen, floyta. Ingeborg Fangel Mo, sang. Thomas Winthereik gittar

3. juli Sct. Severin Pigekor. Kór úr Haderslev





# Skrímslini til Madrid

Skrímslini og »foreldur« teirra fara til Madrid á stóru bókastevnuna Feria del Libro mikudagin. Har skulu tey leggja Skrímslabøkurnar fram og hava eina workshop. Allir tríggir høvundarnir - harmillum føroyska Rakel Helmsdal eru bodnir við í samband við at norðurlond eru heiðursgestir. Tað er danska sendistovan, ið hevur boðið Rakel við.

**Sosialurin** Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*